# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin tann 05. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00000**<br>**Innkallan av varalimi**<br>Borgarstjórin hevur innkalla næstvalda á lista E, sum er Tollakur Joensen, at taka sæti hjá Ólavur F. Olsen. | Einmælt samtykt at Tollakur Joensen tekur sæti fyri Ólavur F. Olsen. |
| 2. | **16/00260**<br>**Umsókn um marknabroyting, matr. nr. 285b í Syðrugøtu**<br>Eigarin av matr. nr. 285b hevur sent umsókn um at fáa gjørt marknabroyting/býtið uppá uml.1,5 metur millum teirra matrikul og vegin hjá kommununi.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at játta markanbroyting millum matr. nr. 285b og vegin hjá Eysturkommunu. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndin.<br><br>*Hanus Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |
| 3. | **16/00019**<br>**Umsókn um stuðul til bygdarsavnið ”Gamli skúli”**<br>Bygdarsavnið “Gamli Skúli” hevur í januar 2016 sent inn umsókn um fíggjarligan stuðul til renovering av Gamla skúla, og til at byggja nýtt WC og fýrrúm. Upphæddin søkt verður um er 725.000 kr v/mvg.<br><br>Umsitingin metir at um ætlanin at fá glið á verkætlanina í ár, kundi gólvið í skúlanum verið gjørt fyrst. Sambært teknisku umsiting er tað lættari at koma víðari at smíða og fyrireika møguligan gólvvarma, tá gólvið er stoypt.<br><br>Umsitingin mælir til at seta fer á arbeiðið við at samanleggja Bygdarsavnið “Gamli Skúli” og Gøtu Fornminnissavn til eitt kommunalt savn, fyri at tað skal blíva lættari at søkja um stuðul frá Søvnum Landsins.<br><br>Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin tann 05. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Fyri at fáa glið á verkætlanina í ár mælir Mentanarnevndin eisini til at seta gongd á gólvarbeiði inni í Gamla Skúla. Men greiðari kostnaðarmeting av gólvarbeiðnum má gerast fyrst. Herundir skal kannast um peningur er tøkur til endamálið inni á “5.24.32 Søvn og Mentanararvur”.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto 5.24.32.510 (Søvn og mentanararvur).

**4. 16/00267**

**Umsókn um keyp av lendi millum matr. nr. 389x og 389v í Leirvík**

Kommunan hevur móttikið umsókn frá eigarum av matr. nr. 389x og 389v um loyvi at keypa 2-metrar geiran, sum er millum hesu bæði stykkir og leggja tey helvt um helvt til omanfyri nevndu matriklar.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini, um at umsøkjarir fáa loyvi at nýta økið til skráa, men mæla frá at selja lendið millum matr. nr. 389x og 389v, og at kommunan ikki ber kostnaðin at taka tilfarið burtur, tá ið økið skal brúkast av kommununi.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Emma Rasmussen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**5. 16/00061**

**Leigusáttmáli millum Eysturkommunu, leigara og Landsverk fyri neystaøkið á Toftanesi**

Uppskot um leigusáttmála var gjørt og sent til advokat til góðkenning. Leigari/ar góðtaka ikki orðing í grein 5, um at eigarin av lendinum, sum er kommunan, hevur rætt til at yvirtaka tað á økinum bygda neystið fyri 50% av tí virði, tey tá verða mett til.

Leigarir ynskja at tað skal standa 100% av

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

virðinum, tey verða mett til.

Byggi- og býarskipanarnevndini mælir til at teksturin í sáttmálanum verður broyttur til at tað stendur 100%.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**6.** **16/00249**

**Umsókn um marknaumskipan og keyp/søla av matr. nr. 254 í Leirvík**

Í sambandi við fríðkanararbeiðið sum verður gjørt úti í Bug í Lerivík, eg neyðugt at Eysturkommuna keypir matr. nr. 254 sum liggur fram við Mataránni í Leirvík. Kommunan ætlar at stykkið, sum er uml. 38 $m^2$ stórt verður lagt til vegin litra K.

Mettur kostnaður er 10.000,00 kr. sum verður tikin av konta 6.22.11.510 (Løgujáttan) Byggibúning bústaðir.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at keypa matr. nr. 254 í Leirvík og at leggja hetta stykkið til vegin litra K.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**7.** **16/00227**

**Skifta gummigranulat á FIFA vølli**

Kommunan hevur móttikið prís uppá nýtt gummigranulat til FIFA vøllin í skúlagarðinum í Gøtu og FIFA vøllin uppi við Garð í Leirvík. Kostnaðurin fyri gummigranulatið er 49.500,00 kr. uttan mvg. Umframt nýtt gummigranulat skal verðandi tilfar takast upp og beinast burtur, og tað nýggja tilfarið koyrast á vallirnar, hetta verður mett at kosta uml. 30.000,00 kr. – samlað 80.000,00 kr. uttan mvg.

Eingin játtan er til at skifta gummigranulatið út á

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin tann 05. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

hesum vallum og verður neyðugt við eykajáttan.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at skifta gummigranulatið á FIFA vøllunum í skúlagarðinum í Gøtu skúla og við Garð í Leirvík, og at veita eykajáttan uppá kr. 80.000,00 uttan mvg til útskifting av gummigranulatinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Peningurin verður tikin av konto 6.11.32.511 (Fríðkan av kommununi).

**8. 16/00222**

**Umbøn um viðmæli viðv. umsókn um sundurbýti matr. nr. 94d í Norðragøtu**

Advokatskrivstovan hevur sent kommununi umsókn um sundurbýti av matr. nr.94d í Norðragøtu.

Á heimasíðuni www.ogn.fo stendur at grundøkið er uml. 900 m2 og liggur í sethúsaøki. Hesin parturin sum skal býtast frá liggur ikki í sethúsaøki, men í almennum og mentanarøki.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva loyvi at gera sundurbýti av matr. nr. 94d. Byggi- og býarksipanarnevndin mælir somuleiðis til at kommunan keypir stykkið tá ið sundurbýtið er framt og at fáa eykajáttan til keypið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Peningurin verður tikin av konto 6.22.11.510 (byggibúning).

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

.

**9. 16/00283**

**Krani til havnina í Norðragøtu**

Kranin á havnaøkinum í Norðragøta riggar ikki meir.

Umsitingin hevur inheintað tilboð uppá nýggjan krana, men eingin játtan er til keyp av nýggjum krana.

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

*Tollakur Joensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur mánadagin tann 05. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Vinnunevndin mælir ti at keypa nýggjan krana, og veita eykajáttan til keypið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini. Peningurin verður tikin av konto 7.38.14.511-20 (Havnir og lendingar).

**10. 14/00382**

**Flísaálegging byggistig 2, Syðrugøtusandur**

Málið er umrøtt og viðgjørt á fundi 20. apríl og á fundi 19. mai, har BOB ynskir nakrar tillagingar við atliti til hæddina á flísatúni, t.v.s. at fáa túnið niður móti ánni soleiðis at tað ikki eru høgir garðar fram við rampanum oman á sandin. Eisini er ynski um at fáa boða í garðin sum er millum gongubreytina og flísatúnið.

Uppskot og kostnaðarmeting er móttikið, men kostnaðarmetingin er hægri enn játtanin fyri 2016.

Játtanin til Syðrugøtusand er 500.000,00 kr., men herav er peningur brúktur til betongfundamentini undir sandinum. Neyðugt er við eykajáttan til Flísaarbeiðið, mvg, óvæntaðar útreiðslur og ráðgeving.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja uppskotinum og bjóða arbeiði út, tó skal prosjektið rættast til, at tað er møguligt fyri eldri fólk, fólk við breki, fólk við barnavogni v.m. hava møguleika at koma inn á gøtuna niðanfyri húsini hjá Flemming og út til lendingina.

Eisini verður mælt til at brúka ljóspullertar sum spjaða ljós, ístaðin fyri høgar gøtulyktir.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at bjóða arbeiði út í ár og gera arbeiði fyri 400.000,00 kr. ið er játtan fyri 2016 og at fáa játtan á 600.000,00 kr. til prosjektið í 2017.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Árni Jacobsen

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin tann 05. september 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________